ítróttur

Nr. 206 • hósdagur • 30. oktober 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

FM í billard byrjar

BILLARD
tíðindaskriv

Hetta er tíðin, við kulda og myrkuri, tá eisini innandurakappingarnar í FM í billard byrja. Kappingin byrjar longu hetta vikuskiftið. Liðini í kappingini eru ikki eins nógv sum undanfarin ár. Hvørki Fuglafjarðar Billardfelag ella Vágs Billardfelag eru við hesaferð. Liðini sum luttaka eru: Klaksvíkar Klubbi, Tvøroyrar Klubbi, Kaggin (tvey lið) og Havnar Klubbi. Hetta vikuskiftið spæla: Kaggaliðini spæla móti hvørjum øðrum í Kagganum, og Havnar Klubbi fer til Tvøroyrar at spæla.

Kappingin í 2. og 3. deild er ikki endaliga løgd enn.

B71 á netinum

Heimasíðan hjá B71 telist uttan iva millum tær allar snøggastu á netinum



Sandoyingar hava nú fingið sína almennu heimasíðu, har tíðindi av ymsum slag úr føroyska fótbóltsheiminum eru at frætta

HEIMASÍÐA
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

www.b71-sandoy.com. Soleiðis eitur nýggjasta av teimum almennu føroysku fótbóltsheimasíðunum, og tó at talan er um eitt av smærru feløgunum í landinum, so er hetta als ikki nakað, sum sæst á heimasíðuni.

Tvørtur ímóti man talan vera um eina av teimum heimasíðunum, sum í útsjónd eru ruddiligast og hentast at ferðast inni á. Stórur dentur tykist vera lagdur á tíðindapartin á síðuni, og tað eru á ongan hátt bert lokal tíðindi, sum her eru at lesa. Væl verður fylgt við í altjóða fótbóltinum, einjs og tíðindi úr øllum tí føroyska fótbóltsheiminum eru at síggja.

Hartil eru sjá´lvandi eisini hópin av upplýsingum um sjálvt B71. Venjingartíðir, søga, lógir og eisini dómarabólkar kunnu finnast uttan stórvegis hóvasták, og yvirhøvur tykist vera lætt at fáa fatur í ábyrgdarpersónunum í felagnum.

Yvir høvur ein sera góð heimasíða, sum í øllum førum í útsjónd og funktionaliteti leggur flestu kappingarneytarnar afturum við fleiri bátslongdum.

Skráin í 1. deild vetrarhálvu 2003/2004 – 5 lið (dupultkapping)

31.10.03	Tvøroyrar Billardfelag	-	Havnar Klubbi
	Kaggin 1	-	Kaggin 2
15.11.03	Tvøroyrar Billardfelag	-	Kaggin 1
	Havnar Klubbi	-	Klaksvíkar Billardfelag
04.12.03	Klaksvíkar Billardfelag	-	Tvøroyrar Billardfelag
	Kaggin 2	-	Havnar Klubbi
12.12.03	Kaggin 2	-	Tvøroyrar Billardfelag
	Klaksvíkar Billardfelag	-	Kaggin 1
09.01.04	Havnar Klubbi	-	Kaggin 1
	Kaggin 2	-	Klaksvíkar Billardfelag
23.01.04	Havnar Klubbi	-	Tvøroyrar Billardfelag
	Kaggin 2	-	Kaggin 1
06.02.04	Kaggin 1	-	Tvøroyrar Billardfelag
	Klaksvíkar Billardfelag	-	Havnar Klubbi
20.02.04	Tvøroyrar Billardfelag	-	Klaksvíkar Billardfelag
	Havnar Klubbi	-	Kaggin 2
05.03.04	Tvøroyrar Billardfelag	-	Kaggin 2
	Kaggin 1	-	Klaksvíkar Billardfelag
19.03.04	Kaggin 1	-	Havnar Klubbi
	Klaksvíkar Billardfelag	-	Kaggin 2

Skytte sum talentstjóri

Meistaravenjarin úr HB hevur skrivað undir sáttmála við danska Fremad Amager

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Danska heimasíðan, fodboldland.dk, veit at siga, at Frank Skytte, sum í ár leiddi HB til meistaraheitið, hevur gjørt sáttmála við danska Fremad Amager.

Frank Skytte, sum nú er 53 ár, skal tó ikki vera høvuðsvenjari í felagnum. Hinvegin verður hann maðurin, sum framyvir skal standa fyri menningini av ungu leikarunum í felagnum, soleiðis at hann hevur ábyrgdina av talent-venjingini og næstbesta liðnum hjá felagnum, sum í løtuni spælir í keypmannahavnarríðini. Hartil skal Skytte eisini hava ábyrgdina av venjaramenningini í felagnum.

Umframt Skytte, so eru tó eisini onnur føroysk ískoyti í Fremad Amager. Sum kunnugt, so skrivaði Jann Ingi Petersen í heyst undir sáttmála við felagið, og hartil veit heimasíðan hjá HB at siga, at Andrew av Fløtum fyri stuttum hevur royndarvant við felagnum. Hvørt hetta seinasta er ein liður í tilgongdini av Frank Skytte, er tó ikki greitt.

Frank Skytte er nú settur í starv sum talent-stjóri í danska Fremad Amager

Vónir og hagfrøði hjá føroyingum í donsku 1. deild

John Arni Nilssen er uttan iva sterkasta føroyska kortið í talvkappingini

Liðkappingin í Danmark byrjar 15. november, og spennandi verður at fylgja gongdini hjá føroysku útisetunum í donsku elituni. Í Sosialinum vera upptakstgreinir undan hvørjum dysti í vetur. Fyrsta upptaktin lýsir mótstøðuliðini, umframt vónir og mál hjá føroyska felagnum.

UPPTAKT
Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn

Talvfelagið Føroyar í Keypmannahavn, sum er talvfelag fyri føroyskir útisetar, bleiv stovnað 14. september 1984. Felagið hevur líka síðan stovnanina luttikið í donsku liðkappingini. Fyrstu tíggju árini vann felagið seg longur og longur upp í lokalu seriunum, fyri síðani í 1995 at rykkja upp í donsku 3. deild. Í triðju deild eru fimm bólkar við átta liðum í hvørjum bólki. Árini 1995-2003 hevur felagið havt lið í triðju og aðru deild, sum hevur tveir bólkar við átta liðum.

Seinasta kappingarár eydnaðist endiliga at røkka ovastu rók innan danska liðtelving, táið felagið rykti upp í donsku 1. deild, harið bert átta felog eru umboðaði.

Vónir og mál

Vónirnar til fyrst árið í ovastu deildini eru góðar. Seinasta ár táið felagið vann 2. deild, hevði felagið valt at styrkja seg við einum sterkum donskum altjóða meistara (IM), Nikolaj Borge, og tað vísti seg at geva bonus. Føroyska telvararnir og serliga John Arni Nilssen telvaðu eisini væl. Tó varð tað ikki ein tryggur sigur, liðið fekk í seinasta kappingarári. Seinasta umfar gjørdist sera spennandi, men loksins lógu føroyingarnir tíbetur ovast og ryktu upp í fremstu rað.

Málið fyri fyrsta árið í 1. deild, er stutt og greitt at halda seg í deildini. Til tess er liðið styrkt við norska stórmeistaranum Einar Gausel, sum er næsthægsti telvarin á norska styrkilistanum. Við norska ískoytinum, eigur at verða góðir møguleiki at halda seg uppi í 1. deild. Hvør veit, við sindur av viðvindi kunna føroyingarnir enda í topp trý. Møguleikin er als ikki heilt fjarur.

Føroyska liðið er styrkismett nr. 4 av teimum 8 liðunum. Atljóðu ratingtølini hjá føroyingunum og umboðunum á mótstøðuliðunum eru nýtt til samanberingar og útrokningar. Sjey umfør skula telvast, tískil er møguligt at vinna sær í mesta lagið 56 stig.

Vangamyndir av liðunum

Helsinge hevur vunnið danmarksmeistaraheitið seinastu trý árini. Liðið telur tveir stórmeistarar, Petur Heine Nielsen, ið eisini er hægst rataði danin, og Lars Schandorff. Men tað er í teirra sera sterku breidd, at teir gera seg galdandi — ikki færri enn seks altjóða meistarar eru á liðnum hjá Helsinge. Tveir av IM'arunum eru sviar og koma neyvan at telva serliga nógv talv. Undir øllum umstøðum er Helsinge sera sterkt og má metast sum favorittar at endurvinna meistaraheitið. Telvararnir úr Helsinge hava úr 2626 og niður í 2354 í rating.

Næsta liðið er Skolerne úr Århus. Hetta er eisini eitt sera sterkt lið við seks IM'arum. Liðið kláraði seg sera væl síðsta kappingarár. Helsinge og Skolerne lógu javnir í stigum tá ið kappingin varð lokin, og tískil mátti umdystur til, sum Helsinge vann. Av tí at Helsinge meldaði avboð, umboðaði Skolerne Danmark við heiðurligum úrsliti í Europa Cup, sum bleiv leikt í septembur. Telvararnir hjá Skolerne hava 2510 og niður í 2375 í rating.

Liðið úr Brønshøj sær út til at liggja á einum tryggum tríðja plássi eftir styrkismetingunum. Tvey tey ovastu borðini eru mannaði við GM Tiger Hillarp-Persson og IM Kim Pilgaard, sum báðir eru kendir í føroyskum talvhøpi. Brønshøj var eisini styrkismett sum nr. 3 seinasta ár, men bleiv bert nr. 4 við 26_ stigum. Orsøkin varð helst, at Tiger bert telvaði trý talv og sjálvt um hann fekk hálvtríðja stig, so varð allarhelst stórur saknur í honum tey umførini hann ikki leikti við. Liðið telur tveir stórmeistarar og tveir IM'arar. Telvarnir hava úr 2512 og niður í 2253 í rating.

Spjaðingin í styrki er eitt sindur størri á føroyska liðnum, enn á hinum liðunum. Liðið er tvíbýtt, soleiðis at ovara helvtin hevur omanfyri 50% í væntaðu skoru og niðara helvtin hevur undir 50% í væntaðu skoru.

Sjálvt um John Arni hevur meira í rating enn Nikolaj, so er hann settur aftanfyri á tríðja borð. Vanligt er, at borðini verða mannaði eftir styrki. Orsøkin til hesa rokering er, at John Arni sum oftast er eirindarleysur ímóti veikari telvarum, meðan Nikolaj ofta hevur fingið sera góð úrslit ímóti heilt góðum telvarum. Vónandi fær liðið fleiri stig orsakað av taktisku broytingini.

Niðara helvt

K41 hevur ein stórmeistara á fyrsta borði, Henrik Danielsen, sum eisini nakrar ferðir hevur verið og telvað í Føroyum. Annars er liðið javnt sterkt, og sum heild nakað veikari á pappírinum enn føroyska liðið. Teir hava úr 2496 niður í 2157 í rating.

Liðið úr Århus bleiv sera yvirraskandi nr. 3 seinasta ár. Flestu telvararnir á liðnum telvaðu yvir evni, men vónandi gera teir tað ikki aftur í ár. Tveir IM'arar eru á liðnum og telvararnir liggja úr 2403 niður í 2179 í rating.

SK68 er eisini úr Århus og er mannað við sera javnt sterkum telvarum. Eingin IM'ari ella GM´ari og telvarnir hava úr 2347 niður í 2235 í rating. Bert áhugaleikarar telva við liðnum. Føroyingurin Jóan Hendrik Andreassen (2135), sum er búsitandi í Århus, er limur í SK68, men hann plagar at vera við øðrum liði hjá SK68, sum telvar í 3. deild. Nørresundby vann 2. deild vestur seinasta ár og eru tí fluttir upp saman við føroyingunum, sum vunnu 2. deild eystur. Liðið er mannað við áhugaleikarum uttan tittultelvarum. Teir hava úr 2376 niður í 2164 í rating.

1-2. umfar

Liðkappingin byrjar sum kunnugt leygardagin 15. novembur. Tvey umfør skulu telvast hetta vikuskiftið, har øll feløgini í 1. deild leika undir somu lon. Leygardagin 15. novembur hitta føroyingarnir Nørresundby, og sunnudagin 16. novembur verður mótstøðuliðið SK 68.

Næsta upptaktsgrein fer at snúgva seg um hesar dystir, umframt at telvararnir á føroyska liðnum verða nærri lýstir.

Styrkismeting av liðunum í donsku 1. deild 2003/2004

	Miðal rating	Væntað skora	Væntað skora%
1 Helsinge	2440,0	37,68	67,3%
2 Skolerne	2415,4	35,68	63,7%
3 Brønshøj	2353,3	30,32	54,1%
4 Føroyar	2318,3	27,36	48,9%
5 K41	2283,1	24,16	43,1%
6 Århus	2277,5	23,84	42,6%
7 SK68	2271,0	23,28	41,6%
8 Nørresundby	2259,0	22,08	39,4%

Føroyska liðið er styrkismett sum nr. 4. Soleiðis verur liðið mannað (altjóða rating):

Borð	Navn	Rating	Tittul	Væntað scora
1 Einar Gausel	2525	GM	4,14	(59%)
2 Nikolaj Borge	2408	IM	3,59	(51%)
3 John Arni Nilssen	2426	FM	4,26	(61%)
4 Flóvin Tór Næs	2337	FM	3,64	(52%)
5 Heini Olsen	2264	FM	3,18	(45%)
6 Eyðun Nolsøe	2227		2,98	(43%)
7 Carl E. N. Samuelsen	2194		2,73	(39%)
8 Heini Danielsen	2165		2,76	(39%)